## Súni vandi í Gøtu

Súni Olsen hevur drigist við ein lítlan skaða seinastu tíðina, men tað tykist heilt víst, at hann verður tøkur til landsdystin leygardagin. Í gjár vandi hann saman við hópinum hjá GÍ, og hetta var fyrsta ferðin síðani skaðan, at hann vandi við bólti. Og hetta gekk heilt væl. Sjálvur staðfesti Súni eisini eftir venjingina, at hann er púrasta til reiðar at fara undir avbjóðingina móti italsku stjørnunum.



## Fleiri skotsk avboð

Umframt avboð frá James McFadden og Kenny Miller hevur skotski landsliðsvenjarin nú fingið enn meira at hugsa um. Tá skotska landsliðið fór til Eysturríkis, har teir skulu spæla leygardagin, vóru hvørki Steven Pressley, Craig Beattie, Russel Anderson ella Scott Brown við í ferðalagnum. Teir tríggir fyrstnevndu verða ikki tøkir til dystin í Føroyum, meðan tað enn er møguligt, at Brown verður tøkur. Einasti spælarin, sum higartil er tikin afturat í hópin, er Christian Dailly úr West Ham. Men McLeish sigur, at hann møguliga fer at taka onkran spælara út afturat, áðrenn farið verður til Føroya.

# AB-loysnin er ávegis

**Sigfríður Clementsen tykist vera eitt gott boð, um navn skal setast á nýggja AB-venjaran. Fyribils verða tað tó Terji L. Dalsgarð og Allan Mørkøre, sum koma at standa fyri venjingunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Sigfríður Clementsen hevur higartil í ár hildið frí frá venjarayrkinum. Men tað er væl hugsandi, at hann verður nýggjur venjari hjá AB*

Tað tykist ikki, sum ætla tey í AB at liggja sjóvarfallið av sær, nú nýggj loysn skal finnast á venjaraspurninginum í felagnum. Oddbjørn Joensen varð í gjáramorgunin sagdur úr starvinum, og gjárkvøldið hevði nevndin fund við spælararnar.

- Fyribils er loysnin tann, at Terji L. Hansen, sum vit longu hava í felagnum, virkar sum høvuðsvenjari, og afturat sær hevur hann so Allan Mørkøre. Allan hevur jú gjørt sáttmála við okkum, men hann fær ikki spælt, fyrr enn flytingarvindeygað letur upp, sigur Eyðun Dalsgarð, formaður hjá AB.

Og hann váttar eisini, at felagið arbeiðir við at styrkja spælarahópin.

- Vit hava gjørt sáttmála við Allan Mørkøre. Hartil er so ætlanin, at vit skulu hava í øllum førum tveir spælarar afturat, og í løtuni verður arbeitt við hesum.

Higartil hevur Súni Fríði Barbá virkað sum hjálparvenjari hjá AB. Við fyribils loysnini, sum nú er sett í kortið, verður hann tó spælari burturav.

- Hartil arbeiða vit í fullari ferð við at finna eina meira varandi loysn. Nær hendan kann gerast endalig, vita vit ikki, men vónandi verður tað fyrsta dagin, sigur AB-formaðurin.

### Møguleikarnir

Um gitast skal, hvør nýggi venjarin verður, so tykist Sigfríður Clementsen vera eitt gott boð. Mett eftir tøku nøvnunum á venjaramarknaðinum, so vil Sigfríður heilt náttúrligt verða ein av teimum allar fyrstu, sum eitt felag setir seg í samband við, um nýggjur maður skal finnast.

Og tá AB vónar, at tey longu nú kunnu seta navn á venjaran, so er væl hugsandi, at avtala er fingin í lag við fyrsta navnið, sum roynt varð eftir.

Eitt annað navn, sum hevur verið nevnt, er Dragan Kovacevic, sum fyrr í ár fekk sekkin á Skála. Hann var millum áskoðararnar á Argjum mánadagin, men tað kann eisini hugsast, at hetta var fyri at heilsa upp á nakrar av teimum, sum hann vandi, tá hann var hjá VB/Sumba. Eisini var Jóannes Jakobsen millum áskoðararnar. Hann hevur fyrr verið venjari hjá AB, og er tí eisini eitt hugsandi boð.

## Formula-liðið




Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 11. umfarinum av Formula-deildini

## Nesta gevst á landsliðnum



Italski landsliðsvenjarin, Roberto Donadoni, sigur, at tað er væl hugsandi, at Alessandro Nesta ikki verður aftur at síggja á italska landsliðnum.

Nesta gav avboð til Føroya-ferðina við teirri grundgeving, at hann skal giftast, men Donadoni ber ótta fyri, at fráveran verður varandi.

- Eg vóni sjálvandi tað besta, men tað tóktist sum ein rættiliga endalig avgerð, sigur Donadoni.

Umframt Nesta hevur Francesco Totti eisini givið avboð til landsliðið. Ein avgerð, sum nógvir italiumenn iðra seg um, tí við 26 málum í júst lidnu seriu A hevur Totti í ár sýnt satt stórspæl.

- Fólk kunnu hugsa tað, sum tey vilja. Men eg skilji hetta meira sum spælarans avgerð um at ansa sær sjálvum og kroppinum, heldur enn at teir siga nei til at spæla fyri heimsmeistararnar. Ein og hvør spælari, sum spælir fyri landsliðið, skal vera væl fyri og motiveraður. Eg havi sjálvandi eisini tosað við Totti og Nesta, og eg góðtaki grundgevingarnar, sum teir hava givið mær, sigur Donadoni.

**-mørk**